Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Kromann Reumert
Sundkrogsgade 5
2100 København Ø

**Att.: Thomas Klausen, adv.** **Tórshavn 20. november 2012**

Journal nr.: 12/00238-10
Viðgjørt: S.R.

**Avgerð um góðkenning eftir einfalda málsviðgerð**

Kappingareftirlitið fekk tann 22. oktober 2012 fráboðan um, at O.W. Bunker & Trading yvirtekur Bergen Bunkers AS, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini. Fráboðanin var fullfíggjað og fekk tí gildi sama dag, sbrt. § 4, stk. 1 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012 um fráboðan av samanleggingum.

Yvirtøkan verður framd við, at O.W. Bunker & Trading A/S keypir 100% av partapeninginum í Bergen Bunker AS frá verandi eigara M7 Bunkers AS. Sostatt fær O.W. Bunker & Trading einaræði yvir Bergen Bunkers og dótturfelagnum Bergen Bunkers Neva LCC.

O.W. Bunker & Trading A/S er partur av Wrist Group A/S, sum holding felagið Wrist Marine Supplies A/S eigur. Wrist Marine Supplies er ogn hjá privata íløgu grunninum, Altor Fund II. Tað er fráboðað, at Altor ikki eigur í øðrum feløgum sum eru viðkomandi fyri viðgerðina av hesi yvirtøku.

O.W. Bunker A/S rekur virksemi innan sølu av brennievni til sjóvinnu, trading av brennievni til sjóvinnu og sølu av flutningstænastum. O.W. Bunkers eigur 30 skip, sum veita brennievni til havnir har O.W. Bunker A/S er til staðar, meðan í havnum har O.W. Bunkers ikki er umboða, verður veitingin framd umvegis ein lokalan veitara.

Høvðusvirksemi hjá Bergen Bunkers AS er innan handil og mekling av bunkaraolju og smyrjiolju til skip um allan heim. Dótturfelagið Bergen Bunkers LCC hevur saman virksemi, men vendir sær bert til russiska marknaðin.

Talan er um eina yvirtøku, sum er fevnd av samanleggingarhugtakinum í § 13, stk. 1 í kappingarlógini, og umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri markvirðini í § 14, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini. Talan er tí um eina yvirtøku, sum kemur undir fráboðanarskylduna í § 16, stk. 1 í kappingarlógini.

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Sambært teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, er talan um eina yvirtøku, sum er fevnd av § 3, stk. 1, nr. 4 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012 um fráboðan av samanleggingum. Við grundarlag í teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, metir Kappingareftirlitið, at yvirtøkan ikki gevur orsøk til ivasemi, og hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er givin treytað av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkur hava givið eru rættar, sbrt. § 18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson

deildarstjóri

Sigurd Rasmussen

fulltrúi